# UMSÓKN UM BROYTING Í LÆRUSÁTTMÁLA

Yrkisútbúgvingarlógin heimilar, at ásetta lærutíðin kann verða stytt ella longd. Aftaná royndartíðina, sum er 6 mánaðir, kunnu sáttmálapartarnir bert ógilda sáttmálan, um báðir partarnir eru samdir um hetta og skriva undir umsóknina um ógilding.

Yrkisdepilin skal góðkenna og skráseta allar broytingar, sum gjørdar verða í einum lærusáttmála. Í sambandi við umsókn um broyting í verandi lærusáttmála, er á hinari síðuni ein vegleiðing til umsøkjararnar og pláss fyri møguligum grundgevingum og øðrum viðmerkingum.

| | |
|---|---|
| Navn á lærlingi: | |
| Bústaður: | |
| Føðingardagur: | |
| Skúli: | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Heitið á útbúgvingini: | | Sáttmálin góðk. tann: | |

| | |
|---|---|
| Navn á læruplássi: | |
| Heimstaður: | |
| V-tal: | |

*Navn, bústaður/heimstaður, føðingardagur og V-tal skal samsvara við lærusáttmálan*

______________________________
Dagfesting

______________________________ ______________________________
Undirskrift lærlingsins Undirskrift virkisleiðarans

## Tilskilað Yrkisdeplinum:

Skrátalið á upprunasáttmálanum:

Við støði í omanfyri givnu upplýsingum er samtykt:

- ☐ at seta lærusáttmálan úr gildi frá ______________________
- ☐ at lærutíðin verður broytt til at enda tann ______________________
- ☐ **ikki** at góðkenna omanfyri nevndu umsókn um broyting í lærusáttmálanum
- ☐ annað ______________________

______________________________ ______________________________
Dagfesting Undirskrift

# VEGLEIÐING

## Leingjan av lærutíð:

Sambært §§ 35 og 36 í yrkisútbúgvingarlógini er ásett, at lærlingur og lærupláss kunnu gera avtalu um at leingja útbúgvingartíðina. Eru lærlingur og lærupláss ikki samd um at leingja útbúgvingartíðina vegna fráveru sum nevnt í stk. 1 í umrøddu lógargrein, kann viðkomandi yrkisnevnd, eftir áheitan frá pørtunum, áseta longda tíðarskeiðið. Eru partanir samdir um at leingja útbúgvingartíðina eftir § 36, skal fráboðan um hetta gerast á hesum oyðublaði. Bæði lærlingur og lærupláss skulu undirskriva fráboðanina á hinari síðuni.

## Leingjan ella stytting av lærutíð:

Sambært § 37 í yrkisútbúgvingarlógini er eisini ásett, at í øðrum førum enn teimum, ið nevnd eru í §§ 35 og 36, kann viðkomandi yrkisnevnd, tá ið serlig viðurskifti tala fyri tí, samtykkja at stytta ella at leingja útbúgvingartíðina.

Er talan um leingjan ella stytting av ásettu lærutíðini eftir § 37, skal umsókn um hetta sendast til viðkomandi yrkisnevnd (Yrkisdepilin). Góðkenningin er vanliga treytað av, at bæði lærlingur og lærupláss undirskriva umsóknina á hinari síðuni.

## Uppsøgn av lærusáttmála.

Sambært § 37 í yrkisútbúgvingarlógini er harumframt ásett, at um onkur týdningarmikil treyt fyri at gera lærusáttmálan er skeiv ella seinni dettur burtur, kann hin parturin siga sáttmálan upp. Aftaná royndartíðina, sum er 3 mánaðir, kunnu sáttmálapartarnir bert ógilda sáttmálan, um báðir partarnir eru samdir um ógildingina. Verður lærusáttmáli sagdur upp, skal fráboðan um hetta gerast á hesum oyðublaði. Bæði lærlingur og lærupláss skulu undirskriva fráboðanina á hinari síðuni.

Møguligar grundgevingar og viðmerkingar umsøkjarans:

| |
|---|
| |

Umsóknarblaðið skal sendast til: **Yrkisdepilin, Postrúm 3279, FO-110 Tórshavn**